HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 6. september 2016 kl. 16:30

Á fundinum vóru: Una Matras, Karin Dahl, Birgir Kass, Bjørghild Djurhuus, Jógvan Arge og Manne Persson

Skrivari: Hans Jón Thomsen

Skrá

Nýtt frá leiðslu/skúla:

Sum heild letur leiðslan væl at skúlabyrjanini skúlaárið 2016/2017.

Skeltingin av Hoyvíkar skúla er nú endaliga viðgjørd, og skeltini verða sett upp í næstum. Miðað verður eftir at fáa skeltini sett upp beint undan ella beint eftir heystfrítíðina.

Eingin telefonpolitikkur er endaliga umrøddur fyri Hoyvíkar skúla. Vit eru tó komin ásamt um, at fartelefonir ikki skulu órógva undirvísingina. Hetta er nakað, ið einstaki lærarin tekur støðu til. Hendir hetta, kann lærarin taka fartelefonina, og næmingurin fær fartelefonina aftur, tá skúladagurin er liðugur. Hendir hetta fleiri ferðir fyri sama næming, so verður telefonin tikin og handað leiðsluni. Tá mugu foreldrini venda sær til skúlaleiðsluna fyri at fáa fartelefonina aftur.

Skúlastýrisval 8. november 2016

Skúlastýrisval verður 8. november 2016 í Høllini á Hálsi. Í hesum sambandi er ein valnevnd vald, ið skal skipa skúlastýrisvalið í Hoyvíkar skúla.

Valnevnd:

Í nevndini eru Hans Jón Thomsen, skúlastjóri, Katrin Nolsøe, umboð fyri kommunustýrið, og Birgir Kass, umboð fyri fráfarandi skúlastýri.

Uppstillingarfundur:

Uppstillingarfundur verður í Hoyvíkar skúla hósdagin 6. oktober 2016 kl. 18:00 – 19:00. Á fundinum greiðir valnevndin frá reglum viðvíkjandi valinum og umrøður onnur viðurskifti, sum hava týdning í samband við valið.

Vallisti:

Ein vallisti við foreldrum, ið eru skrásett á næmingalistunum í Hoyvíkar skúla, verður gjørdur og lagdur fram á skrivstovu skúlans. Á vallistanum stendur navn á foreldri og bústaður. Vallistin verður gjørdur í sambandi við uppstillingarfundin 6. oktober 2016 og skal liggja frammi í minsta lagi 14 dagar.

Valevnislisti:

Uppskot til valevni skulu vera latin valnevndarformanninum í seinasta lagi kl. 18:00 eina viku undan valdegnum. Valnevndin ger ein valevnislista við øllum góðkendum valevnunum.

Á uppstillingarlistanum skulu í minsta lagi vera líka nógvir stillarar sum uppstillað valevni, og ein stillar er ábyrgdarhavndi.

Á hvørjum uppstillingarlista kunnu í mesta lagi vera dupult so nógv valevni, sum skulu veljast. Hesi verða sett upp í bókstavarað.

Atkvøðugreiðsla:

Valnevndin útvegar atkvøðuseðlar og á atkvøðuseðlunum standa valevnini í bókstavarød.

Valnevndin ger eitt yvirlit yvir valevnini, sum verður uppsligið á valstaðnum.

Hoyvíkar skúli ger atkvøðuseðilin kláran, ið skal vera bláur.

Nýtt frá lærarum:

Einki nýtt frá læraraumboðnum í skúlastýrinum.

Nýtt frá Tórshavnar kommunu:

Einki nýtt frá Tórshavnar kommunu.

Nýtt frá foreldraumboðunum:

Eftir munnligan fyrispurning til Tórshavnar kommunu, ert tað nú greitt, at tað ikki ber til at "keypa upp á borg", men avgjørt varð at arbeiða víðari við at keypa sjálva klatripyramiduna og undirlag.

Birgir Kass setur seg í samband við Tórshavnar kommunu og fer hjálp frá kommununi at seta útboðið ígongd.

Miðað verður eftir at fáa brúkt játtanina á 200.000 kr. hetta fíggjarárið. Vit skulu arbeiða fyri, at eitt evt. avlop av játtanini verður flutt yvir til næsta fíggjarár.

Fundurin lokin kl. 18:00